| *Umfarsskriv* | Dagfesting<br>07.06.2004 | 4/2004 |
|---|---|---|
| | AHR. j. nr.<br>0.26-2201159/26 | Síða 1 av 3 |
| Heiti<br>**Kunning og samtykki fyri viðgerð á psykiatriskari deild á Landssjúkrahúsinum** | | |

Í samsvari við *Lov nr. 118 af 13. april 1938 om sindssyge personers hospitalsophold,* sum seinast varð broytt við *lov nr. 225 af 7. juni 1972 (sindssygeloven)* og *Anordning af 30. september 2002 om ikrafttræden for Færøerne af lov om patienters retsstilling (patientretsstillingsloven)* verður fylgjandi áseting fyribils galdandi:

*Cirkulærets område m.v.*

**§ 1.** Viðgerð av sinnissjúkum á psykiatriskari deild á Landssjúkrahúsinum má bara fara fram sambært reglunum í hesum rundskrivi. Viðgerð er sambært rundskrivið fyrst og fremst sjúkuviðgerð og tær avgerðir, sum náttúrliga hava tilknýtið og samband við: kanning, sjúkuavgerðir v.m., har sjúklingurin hevur givið kunnað samtykki.

**§ 2.** Sum høvuðsregla skal eingin viðgerð byrja ella halda fram, uttan at sjúklingurin hevur givið kunnað samtykki. Sjúklingurin kann til eina og hvørja tíð afturkalla sítt samtykki. Kunnað samtykki skal sambært rundskrivinum skyljast sum samtykki, ið er givið við grundarlagi í nøktandi upplýsing frá heilsustarvsfólkunum. Kunnað samtykki sambært hetta rundskriv kann vera skrivtligt, munnligt ella eftir umstøðunum tigandi.

**§ 3.** Sjúklingurin hevur rætt til at fáa upplýst um heilsustand og um viðgerðarmøguleikar, íroknað vandan fyri tvørleika av hjáárinum. Somuleiðis hevur sjúklingurin rætt til at nokta at taka ímóti upplýsing. Upplýsingin skal veitast við jøvnum millumbili við eini vælskiljandi frágreiðing um sjúkuni, kanningina og ætlaða viðgerð á ein skynsaman hátt, og vera hóskandi til fyritreytirnar hjá sjúklinginum í mun til aldur, búning og royndir v.m.

**§ 4.** Upplýsingin skal fevna um viðkomandi fyribyrgjandi-, viðgerðar- og røktarmøguleikar, íroknað upplýsingar um aðrar læknaráðiligar viðgerðarmøguleikar. Harafturat upplýsing um avleiðingarnar, tá sjúklingurin velur, at eingin viðgerð verður sett í verk. Upplýsingin skal vera umfatandi, tá ið viðgerðin hugsandi kann viðføra vanda fyri álvarsamum hjáárinum. Verður mett, at sjúklingurin er óvitandi um viðurskifti, sum eru av týdningi fyri avgerðina hjá sjúklinginum, skal heilsustarvsfólkið serstakliga upplýsa um hetta.

*Aldursómyndingur*

**§ 5.** Ein sjúklingur, sum hevur fylt 15 ár, kann sjálvur geva kunnað samtykki fyri viðgerð. Foreldramyndugleikin skal harafturat hava upplýsing sambært § 4, og verða tikin við í avgerðini hjá tí ómynduga. Metir læknin, at sjúklingurin, sum hevur fylt 15 ár, vegna sinnissjúku, ikki er førur fyri at skylja avleiðingarnar av egnu avgerð, kann foreldramyndugleikin veita kunnað samtykki.

*Sjúklingar, sum støðugt vanta førleika til kunnað samtykki*

**§ 6.** Fyri sjúkling, sum støðugt manglar evni at geva kunnað samtykki, t.d. við ávísum ólekjandi sinnisbrekum, sálarliga menningartarnað og dementum, kunnu næstringar geva kunnað samtykki. Næstringa eru fyrst og fremst, hjúnafelagi, sambúgvi ella nærmasta slekt (lige linie), systkin, alt eftir teimum ítøkiligu umstøðunum. Eftir umstøðunum, serliga har eingin hjúnafelagi, sambúgvi ella børn eru, verður tað næstrafólk, sum sjúklingurin er nær knýttur at ella svágdur við, eisini at meta sum næstringar. Er sjúklingurin undir forsorg, sum umfatar viðurskifti, íroknað heilsuviðurskifti, kann kunnað samtykki verða givið av verjanum. Hevur viðkomandi ongar næstringar, kann viðgerðandi lækni fremja eina hugsandi viðgerð, um annar lækni, sum ikki áður hevur viðgjørt, ella skal luttaka í at viðgerða viðkomandi sjúkling, taka undir við hesum, um viðgerðin verður mett at vera minni umfatandi við atliti til viðgerð og tíð. Metir læknin, at næstringar ella verji veita samtykkið á ein hátt, sum eyðsýnt fer at skaða sjúklingin ella viðgerðarúrslitið, kann læknin fremja viðgerðina um so er, at Landslæknin tekur undir við hesum.

*Stundisligur viðgerðartørvur*

**§ 7.** Um ein sjúklingur, sum fyribils ella við varandi manglandi evnum til at geva kunnað samtykki ella er undir 15 ár, er sinnissjúkur, og har tørvur er fyri stundisligari viðgerð, fyri at sjúklingurin kann yvirliva. Eisini framyvir at betra um møguleikan fyri, at sjúklingurin yvirlivir. Ella fyri einum munandi betri úrsliti av viðgerðini kann viðgerðin, sum læknin er byrjaður við, ella halda fram við eina viðgerð uttan samtykki frá sjúklinginum ella frá foreldramyndugleikanum, næstringum ella verja.

*Sjúklinga uppíblanding*

**§ 8.** Ein sjúklingur, sum ikki sjálvur kann geva kunnað samtykki, jf. §§ 5-7 omanfyri, skal kunnast og verða tikin við í orðaskiftium um viðgerðina, í tann mun sjúklingurin skilur viðgerðarstøðuna uttan so, at hetta ikki skaðar sjúklingin. Viðmerkingar frá sjúklinginum áðrenn og aftaná skal, so vítt tað er viðkomandi og av týdningi, verða tikið við.

*Tilnevna umsjónarverja*

**§ 9.** Í teimum dømum, sum nevnd eru í §§ 5-7 omanfyri, skal viðgerðandi lækni tilnevna ein umsjónarverja til sjúklingin, tá sjúklingurin ella verjin setur ynski fram um hetta.

*Kærurættur*

**§ 10.** Kæra frá einum sjúklingi ella frá verja hans yvir viðgerð sambært §§ 5-7 omanfyri skal leggjast fyri Landslæknan, ið sendir kæruna víðari til Sundhedsvæsenets Patientklagenævn saman við sínum viðmerkingum, uttan so at kæran týðiliga er ógrundað.

*Gildisdagur*

**§ 11.** Hetta rundskrivið verður galdandi frá 1. juli 2004.

Hans Pauli Strøm
landsstýrismaður

/Aibritt á Plógv
aðalstjóri